# Samkynd vælkomin á Føroya Tele

**Ein hin størsta fyritøkan í landinum, Føroya Tele, hevur lagt seg út í kjakið um samkynd og sigur í eini starvslýsing, at trúgv, húðalitur, kynslig sannføring og onnur persónlig viðurskifti einki hava at siga**

SAMKYND
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Føroya Tele fyllir 100 ár í ár, men hevur sum fyritøka megnað at fylgt við samtíðini og endurnýggjað seg sjálva alla tíðina, soleiðis at fyritøkan altíð er við í fremstu røð. Nú hevur fyritøkan enntá yvirhálað Føroya Løgting. Í hvussu so er, tá tað kemur til at nevna samkynd.

Niðast í eini lýsing eftir fólki til starvsfólkadeildina stendur soleiðis: "Á Føroya Tele taka vit ikki dagar ímillum ættarslag, húðalit, tjóðskap, og etniskan uppruna, trúgv ella kynsliga sannføring."

Við Vinnuvitan sigur stjórin í Føroya Tele, Andras Róin, soleiðis:

-Tað besta vildi sjálvsagt verið, at tað als iki var neyðugt hjá okkum at skriva hesi orð í starvslýsingina, men vit kenna, at í løtuni er neyðugt, tí tað er av størsta týdningi, at so nógv og so ymisk fólk sum gjørligt hava hug at søkja starv hjá okkum sigur Andras Róin.

Vinnuvitan hevur somuleiðis spurt Andras Róin, um hetta ikki er talan um eina politiska viðmerking, og til hetta svarar stjórin í Føroya Tele soleiðis:

- Um hetta er ein politisk viðmerking, er torført at siga, eg vil heldur rópa tað eina viðmerking til samfelagsstøðuna sum heild, sigur Andras Róin.




# Ósannur teknifilmur um grindadráp í Føroyum

**Whale and Dolphin Conservation Society hevur gjørt ein teknifilm, sum skal lýsa grindadráp í Føroyum, men hesin filmur, sum ikki er heilt nýggjur, er fullur av villleiðandi upplýsingum**

GRINDADRÁP
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Whale and Dolphin Conservation Society sigur seg vera altjóða røddin fyri verju av hvalum, delfinum og teirra umhvørvi.

Filmurin er gjørdur í 1989, men hevur nú funnið sína leið út á alnetið.

Tað sigst, at tað er kendi sjónleikarin Anthony Hopkins, sum leggur rødd til filmin, men tað hevur enn ikki eydnast okkum at fingið staðfest, um so er.

Men vit kunnu staðfesta so mikið sum, at filmurin er fullur í villleiðandi upplýsingum. Fyri so vítt er tað einasta sanna í filminum, at vit í Føroyum drepa grind. Restin er ógvuliga grov ósannindi í enda í annan.

Sambært stutta filminum, so vitja grindahvalirnir í Føroyum einaferð um árið. Ongin veit hví, men soleiðis er tað bara, verður sagt. Sambært filminum, so gleða øll í Føroyum seg til henda dag, og íbúgvarnir fyrireika serligar bátar, soleiðis at teir kunnu taka í móti hvalunum.




Nógv verður gjørt burtur úr at lýsa, hvussu ræðuligan deyða hvalarnir fáa og sagt verður eisini, at tess meira hvalarnir ýla, tess meira nýtir fjøldin drápið.

Filmurin er lagdur út á YouTube, har beinleiðis leinkjan er HYPERLINK "http://www.youtube.com/watch?v=IWgrl0377Kg" http://www.youtube.com/watch?v=IWgrl0377Kg, men sæst eisini við at fara inn á www.kjak.fo




Leiðari til Fíggjar- og fyrisitingardeildina hjá ALS

Ert tú tann rætti eyg-leiðarin

Les meira á www.als.fo

ALS